www.fma.fo

# Eftirlitsfólk til Sjóvinnustýrið

**Av tí at ein av okkara starvsfeløgum hevur fingið farloyvi verður søkt eftir eftirlitsfólk til Sýnsdeildina til at byrja skjótast til ber. Starvið er tíðaravmarkað og verður sett fram til 31. desember 2011**

**UM STARVIÐ**
***Starvið inniber m.a. hesar uppgávur:***
- Málsviðgerð í samband við umbyggingar og nýbyggingar
- Málsviðgerð og uppfylging av sýnum
- Luttaka í tvørgangandi verkætlanum
- Kanning av vanlukkum á sjónum
- Sýn av bátum og skipum
- Ábyrgd av dygdarmenningarskipanini, ISO 9001

**ÚTBÚGVINGARKRAV**
***Til starvið krevst ein av niðanfyri nevndu útbúgvingum:***
- Maskinmeistaraútbúgving við sjóvinnu-brævi sum skipsmaskinstjóri, STCW III/2
- Skipsføraraútbúgving við sjóvinnubrævi sum skipsførari, STCW II/2
- Verkfrøðingur, sum er serkønur innan sjóvinnu

Ynskiligt er, at umsøkjari hevur starvs-royndir innan dygdarmenning, herundir ISM og ISO 9001 skipanir.

**FØRLEIKAKRØV**
- Góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- Góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- Gott tekniskt innlit
- Góð samstarvsevnir

**SETANARTREYTIR**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Vinnumálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin er Sjóvinnustýrið í Miðvági.

Tann, ið settur verður, má tí kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar upp-gávur í Vinnumálaráðnum. Starvið verður sett sum skjótast.

**UMSÓKNIR**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Sjóvinnustýrinum í hendi í seinasta lagi 1. oktober 2010, kl. 15.00.

Fyrispurningar um starvið kunnu setast til Jákup K. Poulsen, samskipara ella Vilhjálm Gregoriussen, stjóra.

***Umsóknir skulu sendast sum bræv ella teldubræv til:***

Sjóvinnustýrið
Postsmoga 26
FO-370 Miðvágur

ella fma@fma.fo

Sosialurin 341800

## Sjóvinnustýrið

Postsmoga 26, FO-370 Miðvágur, fma@fma.fo

Finn Jakobsen frá SEV



Bogi Bech Jensen



Agnar Dahl



# BILRADIO

**Aktuel bilfíðindi við Maggi Gunnarsson**

## Leygardagin 11. september kl. 17

Í sendingini Bilradio á Rás2 leygardagin 11. september kl. 17 verður samrøða við Finn Jakobsen, sum er tekniskur stjóri hjá elfelagnum SEV, um elbilar, við Boga Bech Jensen, sum hevur doktaragrad í elmaskinum og hevur verið við til at designa og ment elmotorar fyri eitt nú Toyota og Ford. Eisini er samrøða við Agnar Dahl frá AD-Import um Føroya Tele Cup.

Sendingin verður endursend sunnukvøldið 12. september kl. 21

# September-kappingin

Sosialurin

## SUDOKU

Hvønn dag í juli mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.

Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.

Sendið okkum loysnina innan mánadagin 4. oktober 2010 kl. 10.00 og merkið brævbjálvan »Sudoku«.

**Drigið verður í viku 40.**

Fyri at vera við í kappingini, skal øll uppgávan verða loyst.

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 9 | 2 | | 1 | | | | | |
| | | | | 8 | | | 7 | |
| | | 4 | | 9 | | | 2 | |
| | 6 | | | | 7 | 5 | | 8 |
| | | | 6 | | 2 | | | |
| 5 | | 7 | 8 | | | | 9 | |
| | 1 | | | 2 | | 6 | | |
| | 4 | | | 6 | | | | |
| | | | | | 8 | | 3 | 4 |

Vinningurin í september er ein **BlackBerry Gemini - 8520** fartelefon frá **Vodafone**

**Virði tilsamans: kr. 3.495,-**

Navn: ____________________

Bústaður: ____________________

Telefon: ____________________

**Sendið til: Sosialin · Boks 76 · 110 Tórshavn**
**Merkið brævbjálvan »Sudoku«**

## Fakta um BlackBerry Gemini - 8520

- **Egið minni 256 MB**
- **Møguleika at útbyggjað minni upp til 32GB**
- **MicroSD minnskorti**
- **Bluetooth 2.0 við A2DP**
- **Wifi 802.11 b/g**
- **Stand-by 408 tímar (17 dagar)**
- **Talutíð 4 tímar og 30 minuttir**
- **2 MP-myndatól**
- **Media player**
- **Tónleika spælari MP3/AAC/AAC +/WMA/ASF**
- **Video spælari H.263/H.264/ WMV**
- **BlackBerry maps**
- **Blackberry Messenger**




vodafone
power to you